# Eitt óvanligt brek sum vit sjálvandi læra av

**Brekið, sum førdi til, at Jógvan Norði fór til botns, var eitt sjáldsamt brek, sum ikki hevði hent við einum nýggjum skipi, sigur leiðarin á Skipaeftirlitinum**

*Brekið, sum beindi fyri Jógvani Norði, er ikki eitt brek, sum vit kenna til og tí er tað ómetaliga ringt at koma framá, sigur leiðarin á Skipaeftirlitinum*




*Myndin er úr Skipalistanum*

SKIPBROT
*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eigur tað at bera til, at eitt heilt skip skal søkka, bar tí at hol kemur á eitt wc-rør? Ja, tað ber til- tá ið skipið er gamalt.

Tað var júst hetta, sum sendi Jógvan Norði til botns fyri stuttum.

Men tað var eitt ógvuliga sjáldsamt óhapp, sigur Óla Hans Hammer Olsen, sum er leiðari á Skipaeftirlitinum.

– Hetta var eitt óhapp, sum er er ókent og sum tað illa ber til at verja seg fyri.

Tað, sum hendi við Jógvan Norði var, at eitt hol fór á eitt wc-rør sum gongur út ígjøgnum skipssíðuna og tí fossaði sjógvur inn í skipið.

Ein ventilur er á rørinum, sum skal forða fyri, at sjógvur streymar inn í skipið, men tíverri kom hol á rørið á tí lítla stykkinum, sum er ímillum skipssíðuna og ventilin, og tí var onki at gera.

Leiðarin á Skipaeftirlitinum sigur, at øll nýggjari skip hava rottanga, so hetta slagið av óhappi kundi ikki hent við einum nýggjum skipi.

Men Óla Hans Hammer Olsen sigur, at tað er ógvuliga sjáldsamt, at tílikt brek taka seg upp.

– Hetta er ikki ein trupulleiki, vit kenna til og tað er ómetaliga ringt at koma framá, serliga tá ið vit ikki vita, at tað er til.

Men síðani Jógvan Norði fórst, er leiðarin á Skipaeftirlitinum komin at tosa við mann sum segði, at teir høvdu havt sama trupulleika við einum øðrum, gomlum skipi.

Men í tí førinum eydnaðist at pjøssa so frægt uppá rørið, at ongin skaði hendi.

Leiðarin á Skipaeftirlitinum leggur kortini dent á, at nú eru tey so hesar royndirnar ríkari.

– Nú vita vit, at hetta kann verða ein trupulleiki hjá hesm slagi av skipum og so ber sjálvsagt til at hava eyguni eftir, tá ið vit sýna skip í framtíðini, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Jógvan Norði var línuskip av Toftum, hann varð smíðaður úr stáli í Brattvág í Noregi í 1961, har hann eisini varð umbygdur í 1986.

# Góðar royndir av at vera flutt út á bygd

**– Nú er eitt gott ár síðani at Skipasýnið flutti vestur í Vágar og leiðarin sigur, at royndirnar eru bara góðar**

ALMENNUR STOVNUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er nú eitt gott ár síðani, at Skipaeftirlitið flutti vestur í Vágar og leiðarin, Óla Hans Hammer Olsen, sigur, at tey hava bara góðar royndir at verða flutt út á bygd. Tað einasta skøvan í lakkinum er, at tað er ov dýrt at koyra ígjøgnum tunnilin*

– Tað hevur eydnast nógv betri, enn eg hevði væntað. Tað sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Hann er leiðari á Skipaeftirlitinum.

Nú er eitt gott ár síðani, at Skipaeftirlitið varð flutt úr Havnini, vestur í Vágar. Og leiðarin sigur, at tað hevur gingið nógv betri enn væntað.

Tað var eitt djarvt stig, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í fjør, Jørgen Niclasen tók, tá ið hann gjørdi av at flyta skipaeftirlitið vestur í Vágar.

Hetta var fyrstu ferð, at nakað so óhoyrt var hent, sum tað, at ein heilur almennur stovnur varð skryktur upp við rót í Havn og fluttur út á bygd.

Tað vóru eisini tey, sum vóru meiri enn ivingarsom um ætlanina.

Men nú eitt gott ár er farið, er tað ein vælnøgdur leiðari, sum lítur aftur um bak.

Eg kann ikki siga annað, enn at tað hevur gingið ógvuliga væl, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

– Tað hevur í veruleikanum gingið nógv betri, enn eg hevði væntað, at tað fór at gera, leggur hann afturat.

## Betala ein triðing í Leigu

Hann sigur, at tað er ein politisk avgerð, at Skipasýnið skuldi flyta vestur í Vágar.

– Og fáa vit teir hentleikar, sum skulu til, eitt nú høli, gott elektroniskt samskifti og aðrar hentleikar, er onki í vegin fyri tí.

Og tað hevur Skipasýnið fingið, tí leiðarin sigur, at tey eru sera væl nøgd við umstøðurnar.

Hann sigur, at í Havnini hevði Skipasýnið eini høli upp á 200 fermetrar, sum danska skipasýnið átti.

– Vesturi í Vágum hava vit fingið nógv betri høli. Hølini, vit nú húsast í, eru einar 270 fermetrar.

Óla Hans Hammer Olsen sigur, at harafturat er sera stórur munur á leigukostnaðinum í Havn og úti um landið.

– Eg vil meta, at leigan vesturi í Vágum er ikki meiri enn ein triðing av tí, sum hon er í Havnini, so fíggjarliga er tað eisini ein fyrimunur at vit eru flutt vestur.

Hann sigur, at hølini í Vágum eru hartil innrættað til endamálið og at tey hava allar hentleikar, sum krevjast. so hann dugir ikki at síggja nakað at verða ónøgdir við.

– Tað skuldi kanska akkurát verið prísurin fyri at koyra ígjøgnum undirsjóvbartunnilin, sum eg haldi er ov høgur, sigur leiðarin á Skipasýninum.

Men tann trupulleikin hava tey á Skipaeftirlitinum felags við øll tey vágafólk, sum hvønn dag skulu av oynni til arbeiðis, størri enn so er hann ikki.

## Onki í vegin fyri at flyta

Óla Hans Hammer Olsen sigur, at tískil er teirra royndir, at tað er onki í vegin fyri at flyta almennar stovnar út á bygd.

Sostatt kann metast, at mótviljin ímóti at flyta almennar stovnar úr høvuðsstaðnum fyri ein stóran part snýr seg um fordómar. Eitt annað, er harða mótstøðan ímóti at leggja nystovnaða Heilsuskúlan í Suðuroy. Nú er mótstøan tagnað og yvirhøvur eru øll sera væl nøgd við, at vera í Suðuroynni.

Tó heldur hann ikki, at Skipasýnið hevði ligið so væl í Suðuroy, tí tað er eitt sindur avsíðis við tað, at nógv virksemi hjá stovninum er á meginøkin um.

– Men stovnurin kundi fyri tað verið hvar sum helst á meginøkinum, heldur hann.

Tó heldur hann, at er talan um umsiting, ið hevur nógv við hvønn annan at gera, kann tað vera eitt sindur uttanhanda at liggja langt frá hvørjum øðrum.

Men Skipasýnið er skipasýn og meiri liggur ikki í tí.

– Og hava vit hug til at tosa saman, eru vit ikki longri burtur enn at tað ber væl til.

Óla Hans Hammer Olsen vísir á, at í fyrstu syftu er samskiftið ímillum stovnar so starvsfólk er ikki longur enn ein teldupost burtur og tað gongur meiri og meiri tann vegin at persónliga sambandið ímillum fólk er ikki so nógv í takt við, at telduposturin verður meiri og meiri brúktur.

– Vit senda ofta teldupost ímillum okkum innanhýsis, leggur hann afturat.

Tó heldur hann, at tað eisini hevur ein stóran fyrimun at sleppa av húsinum viðhvørt til fundir og annað.

– Tað er gott at sleppa út viðhvørt. Tú er tvær ferðir so effektivur, tá ið tú kemur aftur, sigur hann

## Ongin fluttur

Tað arbeiða 10 fólk á Skipaeftirlitinum í Vágum. Sjálvur býr hann í Streymnesi, nøkur búgva í Havn og fýra búgva í Vágum.

Óla Hans Hammer Olsen sigur, at hinvegin er ongin fluttur vestur í Vágar at búgva saman við Skipasýninum.

Sjálvur helt hann ikki, at tað var neyðugt at flyta, tí um hann koyrir vestur í Vágar, ella um hann koyrir til Havnar, ger honum tað sama- burtursæð frá tunnilsgjaldinum.

– Tað tekur mær hálvan tíma at koyra til arbeiðis og tað er ongin trupulleiki hjá mær.

Hann sigur, at tey av starvsfólkunum, sum, vóru úr Havn, vóru ikki so fegin fyri at flyta, men tað tykist sum um at tey hava góðtikið støðuna sum hon er, tí tað er ikki longur nøkur ónøgd at hoyra um tað.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jógvan Falkvard 70 ár



Í dag, hósdagin 6. november, fyllir Jógvan Falkvard, útróðrarmaður, í Sørvági, vanliga nevndur Dunga Jógvan, 70 ár.

Jógvan er sørvingur, foreldrini vóru, Josefina, f. Johannesen, úr Vestmanna, og Hans Falkvard, úr Sørvági.

Jógvan hevur siglt alt sítt lív. Hann fór fyrstu ferð til skips sum 14 ára gamal við gamla Høgafossi. Síðan hevur hann siglt við ymiskum fiskiskipum, trolarum og farmaskipum og róði út í Grønlandi í nøkur ár. Seinastu nógvu árini hevur hann verið útróðrarmaður burturav við egnum útróðrarbáti. Síðan Jógvan fylti 67 ár og kom í pensionistaaldurin, er ferðin ikki minkað. Tá flutti hann úr A-bólkinum í B-bólkin hjá útróðrarmonnunum, hetta gjørdi, at hann nú kann rógva út fleiri dagar um árið, enn hann gjørdi áðrenn. Hann er veiðimaður og dámar eisini væl at skjóta harur.

Jógvan er giftur við Elitu, f. Heinesen, úr Sandavági. Tey eiga fýra børn, tey eru: Mervin, Josefina, Eli Jan og Laila. Elita og Jógvan eiga 13 ommu- og abbabørn.

Føðingardagurin verður hildin leygarkvøldið 8. november í húsunum hjá Sørvágs Húsmøðrafelag.

# Heimarøktin 30 ár á baki

TÍÐINDASKRIV



Leygardagin 1. november 2003 vóru 30 ár liðin síðan Heimahjálparaskipanin varð stovnað.

Tað var 1. november 1973, at Heimahjálparaskipanin varð stovnað undir Ríkisumboðnum og sum Føroya Landsstýri yvirtók umsitingina av tann 1. apríl 1975.

Heimahjálparaskipanin tók sær yvirhøvur av øllum, sum húsmóðirin ikki hevði møguleika at gera.

Nógv er broytt hesi seinastu 30 árini, og arbeiðið hjá heimahjálpunum er eisini nógv broytt. Arbeiðið er vorðið meira fleirtáttað.

Í dag er heimahjálpin, sum partur av núverandi Heimarøktini, vorðin ein týdningarmikil táttur í samfelagnum.

Arbeiðið hjá Heimarøktini byggir í dag á megin-regluna um hjálp til sjálvhjálp, sum merkir virðing fyri brúkaranum, og ein roynd at lata brúkaran verða sum longst í egnum heimi.

Landsstýrismaðurin Páll á Reynatúgvu frøðist um tað stóra og týdningarmikla arbeiðið, sum Heimarøktin stendur á odda fyri, og ynskir starvsfólkunum í Heimarøktini hjartaliga tillukku við degnum.

Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin hevði 20 ár á baki í januar 2003.

Fyri samanløgdu skipanina er sostatt talan um tveir merkisdagar í ár, og verður hátíðarhald hildið fyri báðar føðingardagarnir seinni, sigur Páll á Reynatúgvu at enda.

# 25 ára starvsdagur hjá Thomas Dam



Í dag 6.november, hevur Guðrun Lava 25 ára starvsdag. Guðrun fór í læru hjá Thomas Dam í 1978. Guðrun hevur øll árini arbeitt sum bókhaldari, fyrstu árini hjá Thomas Dam og síðani hjá Thomas Dam Ítrótti og Damfar. Guðrun ger ikki nógv um seg, men tó er hon ein sera sentralur persónur, hon er líka sum krumtappurin í fyritøkuni. Spyrt tú starvsfelagarnar um Guðrun sum persón, eru øll samd um, at hon er ein fryntligur, álítandi og sera góður arbeiðsfelagi.

Marita Thorkildshøj:

# 40 ára starvsdag hjá Føroya Tele



1. november 2003 hevði Marita Thorkildshøj í Havn 40 ára starvsdag hjá Føroya Tele.

Marita er úr Sandavági, dóttir Kristionnu, f. Jensen, ættað av Strondum, og Christian Joen-Jacobsen, úr Sandavági.

Eftir at hava tikið preliminerprógv kom hon til Havnar í 1963 og fekk starv á Telefonstøðini sum telefondama. Í 1976 fekk hon starv á skrivstovuni og arbeiðir hon í dag í bókhaldinum hjá Føroya Tele.

Marita er gift við Hákun Thorkildshøj, av Borðuni. Tey eiga fýra børn, tey eru: Kristianna, Elsa, Pól Niklái og Inga.

Marita og Hákun eiga eisini fýra ommu- og abbabørn: Dagny, Marita, Hákun og Fía.




## Dagurin

**6. november. Leonhardus,** deyður í umleið 570. Munkur og trúboðari í Fraklandi. Hann legði ikki í at verða valdur til biskup. Kundi øll lás og allar leinkjur at loysa og gjørdist verndarhalgimenni hjá lásasmiðum og fangum. Navnið er týskt og merkir *leyva* og *harður*.